Fylgiskjal 2

LM-023/2020

ATLANTIC AIRWAYS

Fíggjarmálaráðið
Box 2039
FO-165 Argir

Atlantic Airways Faroe Islands P/F
Vagar Airport
FO-380 Sørvágur
Føroyar

Telefon +298 34 10 00
Telefax +298 34 10 01
Heimasíða: www.atlantic.fo
E-mail janj@atlantic.fo

Your ref.	Our ref.	J. no.	Date
20/00342	*13487-4860/Jan Johannesen*		*21. september 2020*

Góðan dagin,

Ummæli av uppskoti til løgtingslóg um tíðaravmarkað avgjald

Atlantic Airways hevur í telduposti hin 18. september 2020 móttikið uppskot til løgtingslóg um tíðaravmarkað avgjald á ferðandi við komu til Føroyar til ummælis.

Vit hava viðgjørt uppskotið og hava hesar viðmerkingar.

Í sambandi við innkrevjing av tíðaravmarkaða avgaldinum mæla vit til, at gjaldið kann innkrevjast áðrenn ella við komu til Føroyar og at flutningsfyritøkur ella umboð teirra kunnu krevja ómaksgjald fyri eykakostnað, tá ferðafólk velja ikki at gjalda umvegis talgilda innkrevjingarskipan. Harumframt kemur ikki nóg greitt fram, at avgjaldið er frítikið fyri mvg.

§ 1
Mælt verður til at broyta orðingina soljóðandi: *"Áðrenn ella við komu skulu ferðandi, sum eru 12 ár ella eldri rinda eitt avgjald á kr. 312,00. Heimilað verður flutningsfyritøkum ella umboðum teirra at krevja ómaksgjald.*

Viðmerking til § 1
Heimildin hjá flutningsfyritøkum ella umboðum teirra at krevja ómaksgjald er fyri eykakostnað í sambandi við innkrevjing, tá ið ferðafólk ikki velja at gjalda umvegis talgilda innkrevjingarskipan.

§ 2
Mælt verður til at strika orðini *"í sambandi við sølu av ferðaseðlum."*

Viðmerking til § 2
Mælt verður til at strika orðingina *"í sambandi við sølu av ferðaseðlum"* bæði í lógartekstinum og í viðmerking til $ 2, orsaka av, at flutningsfyritøkur ella umboð teirra, eiga at kunnu innkrevja avgjaldið umvegis talgilda innkrevjingarskipan áðrenn komu til Føroyar.

Uppskot til broytta orðing av øðrum setningi: *"Um ferðaseðilin er seldur tá hendan løgtingslóg kemur í gildi, setir flutningsfyritøkan seg í samband við tann ferðandi til tess at tryggja, at avgjaldið verður rindað áðrenn ella við komu til Føroyar."*

ATLANTIC AIRWAYS

Viðvíkjandi 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur eisini tað avleiðing fyri vinnuna, at ferðafólkatalið til og úr Føroyum sannlíkt verður lægri við hesum avgjaldi, enn uttan avgjald.

Vinarliga,
Atlantic Airways P/f

Johanna á Bergi

LM-023/2020

Bára Michelsen

Emne: Til ummælis - Uppskot til løgtingslóg um tíðaravmarkað avgjald á ferðandi við komu til Føroyar

Fra: Jóhanna á Bergi <johanna@atlantic.fo>
Sendt: 21. september 2020 15:53
Til: Bára Michelsen <Bara@fmr.fo>
Emne: RE: Til ummælis - Uppskot til løgtingslóg um tíðaravmarkað avgjald á ferðandi við komu til Føroyar

Hey aftur,

Ein lítil rætting (manglar "til Føroyar") – § 1 Mælt verður til at broyta orðingina soljóðandi: *"Áðrenn ella við komu **til Føroyar** skulu ferðandi, sum eru 12 ár ella eldri rinda eitt avgjald á kr. 312,00. Heimilað verður flutningsfyritøkum ella umboðum teirra at krevja ómaksgjald.*

Vh.,
Jóhanna